Havsins Rolls Royce

Føroyskir menn skulu fáa hendan spildurnýggja trolaran, flaggskip grønlendinga, at bera seg fíggjarliga. Prísurin er 134 milliónir krónur. Hann var á Havnini í vikuskiftinum og kastar fyrstu ferð í dag í Eysturgrønlandi

Jústinus Leivsson
Eidesgaard

Akamalik er stásiligasta fiskifar grønlendingar eiga

Teir gerast størri og størri, rækjutrolararnir, effektivari og effektivari og snotiligari og snotiligari. Leygardagin lá nýggjasti trolarin hjá Royal Greenland, Akamalik á Havnini. Hann er nýbygningur, bygdur í Spania og skræddaraseymaður at fiska rækjur í Grønlandi.

Í dag kastar hann fyri fyrstu ferð. Leiðin gekk til Eysturgrønlands og skipari hendan túrin er Linjohn úr Skálavík. Hann er royndur rækjuskipari. Og tað er ongin trupulleiki, um nógv rækja er undir. Í Eysturgrønlandi hevur altíð verið nógv av stórari rækju at fáa, og hendan verður seld til Japans. Hon verður pakkað í 1 kg eskjur. Vanligir rækjubátar í dag kunnu pakka 10 tons av Japanrækjum, nýggi Akamalik kann pakka 35 tons av japanrækjum. Hann kann eisini frysta 65 tons av øðrum rækjum. Teoretiskt kann hann arbeiða 100 tons av rækjum undan um dagin.

– Trolarin er havsins Rolls Royce innan rækjubátar, sigur ein errin Jógvan Tróndarson, sum eisini er skipari á bátinum. Hann skal á brúnna næsta túr. Jógvan hevur verið við at byggja bátin sum serkømur og hevur luttikið í arbeiðinum, at fáa bátin so góðan sum møguligt.

– Hann er allur metalliseraður oman dekks og tað merkir at hvør smálutur er viðgjørdur móti rusti. Eitt nú gelendararnir, teir eru fyrst gjørdir til, settir upp og síðan tiknir niður aftur og metalliseraðir. Hetta ger at báturin heldur prís, sigur Jógvan Tróndarson.

Beinleiðis á plattar

Sum nakað heilt nýtt við hesum skipinum, so verða rækjueskjurnar lagdar beinleiðis á plattar, áðrenn tær fara í lastina. Hetta hendir frammi í frystarínum. Fyrr skuldu eskjurnar leggjast við hond á plattarnar og neyðugt var at ganga á teimum. Hetta verður ikki longur. Tær koma á plattum niður í lastina. Har er bert ein maður við einum trukki, og nú er møguleikin fyri at eskjurnar skulu løstast næstan burtur. Hetta økir um virðið av lastini og vit spara eisini tíð, sigur Jógvan Tróndarson.

Jógvan Tróndarson fór saman við Linjohn yvir til Grønlands við gomlu Sólborg í 1986. Teir fiskaðu fimm ár við Sólborg. Síðan fóru teir umborð á nýbygningin Kaassassuk.

– Vit hava siglt við Kaassasuk í 10 ár. Hann kostaði 75 milliónir at byggja og hann varð seldur aftur fyri 75 milliónir og í hesum 10 ára skeiði fiskaði hann fyri eina milliard, so vónirnar fyri at nýggi bátur in fer at bera seg eru góðar, sigur Jógvan Tróndarson.

Akamalik er bygdur 15 ár fram í tíðina. Hann er sera sterkur og pláturnar við vatngangin frammi í gron eru fimm sentimetrar tjúkkar. Hann hevur ríkiliga tóvmegi og hann hevur heilar átta rækjuskiljarar. Vanligt er at hava tríggjar.

Starvsfólk til Bókhaldið

„Ein fyrimunur við at vera óvuddliggur, er, at eg í heilum geri nýggjar og spennandi uppdagingar"

Palle Pumm



Til okkara bókhald verður søkt eftir einum fólki at byrja skjótast gjørligt.

Í Bókhaldinum eru 9 starvsfólk. Høvuðsuppgávurnar í deildini er umsiting av kreditorum, lønum, kassum og fíggjarbókhald. Øll bókføringin er á Oracle Financials.

Tann, sum settur/sett verður, má rokna við at luttaka í ølium uppgávum á deildini.

Tin førleiki:
Tú skal hava skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á, at tú kann taka ábyrgd og arbeiða sjálvstøðugt.

Tað er eisini ein fyrimunur at hava
- førleika við EDV
- skúla t.d. merkonom, HH ella aðra viðkomandi útbúgving
- góðan rækjuskap
- góð samstarvsevni

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum góðum, avbjóðandi og mennandi umhvørvi.

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar viðvíkjandi starvinum kunnu fáast við at ringja til Martin á Mýruni, deildarleiðara, tlf 30 30 30 lokal 3205 ella Heina Joensen, fíggjarstjóra, lokal 3297.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum viðmælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mikudagin 02. januar 2002.

Umsóknir skulu sendast til

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein tjóðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisfutningunum í Føroyum. Meningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, og hetta setur stór krav til fyritaku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir ákrikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum!